# Tveir læknar á Eiði

**Læknaviðurskiftini í Eiðis læknadømi skulu betrast, og tí skal ein kommunulækni afturat setast í læknadøminum**

KOMMUNULÆKNAR
*Eyðun Klakstein*

Almanna- og Heilsumálastýrið fer nú at søkja eftir einum kommunulækna afturat til Eiðis læknadømi, har bara ein kommunulækni er.

– Tað hevur ferð eftir ferð verið víst á, at arbeiðsbyrðin hjá einsamalla kommunulæknanum er alt ov stór, tí økið er stórt. Tí fara vit nú at søkja eftir einum kommunulækna afturat til Eiðis læknadømi, sigur Helena Dam á Neystabø, sum er landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum.



*Nú fær kommunulæknin, Magnus á Stongum, ein starvsfelaga í Eiðis læknadømi*



*Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*

Eiðis læknadømi umfatar Eiðis, Hósvíkar, Haldórsvíkar, Sunda, Funnings og Gjáar kommunur

## Magnus fær starvsfelaga

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum heitti á Kommunulæknaráðið um at viðgera málið, og ráðið kom til somu niðurstøðu sum landsstýrismaðurin. Ein kommunulækni eigur at verða settur afturat í læknadøminum.

Magnus á Stongum hevur nógvu seinnu árini røkt starvið sum kommunulækni í Eiðis læknadømi, og hann kann nú gleða seg til at fáa ein starvsfelaga.

– Vit søkja beinanvegin eftir einum kommunulækna, og vit vóna, at hann kann verða settur í mars ella apríl mánaði, sigur Helena Dam á Neystabø.

## Menna heilsutænastuna

Sambært nýggju kommunulæknalógini skulu kommunurnar syrgja fyri, at viðtaluhøli eru til kommunulæknarnar, og í so máta eru viðurskiftini í Eiðis læknadømi í lagi.

Bæði á Eiði og á Oyrabakka eru viðtaluhøli, og teir báðir kommunulæknarnir skulu framyvir arbeiða á báðum støðunum eftir eini fastlagdari skipan.

– Tað er avgerandi, at vit menna ta beinleiðis og primeru heilsutænastuna kring landið, serstakliga í samband við at miðað verður eftir at byggja upp økistænastur innan til dømis sálarfrøði og aðra ráðgeving og viðgerð.

## Eisini í Havn

Fleiri av læknadømunum kring landið kundu hugsa sær fleiri kommunulæknar. Eitt av økinum er miðstaðarøkið, har átta kommunulæknar eru.

Helena Dam á Neystabø sigur, at so skjótt sum viðtaluhøli eru tøk til tann 9. kommunulæknan í Suðurstreymoy, ætlar Almanna- og Heilsumálastýrið at virka fyri, at ein kommunulækni afturat verður settur í hesum læknadømi.

# Steinbjørn farin til verka

**Steinbjørn Jacobsen er triðji borgarstjórin í Klaksvík seinastu 20 árini**

KLAKSVÍK
*Eyðun Klakstein*

Nývaldi borgarstjórin í Klaksvík er nú farin til arbeiðis í býráðsumsitingini.

Steinbjørn Jacobsen loysir Jógvan við Keldu av, og næstu fýra árini skal Steinbjørn verða leiðarin í einum býráðsmeiriluta millum Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Steinbjørn Jacobsen er bara triðji borgarstjórin í Klaksvík síðani 1980. Av seinastu 20 árunum hevur Jógvan við Keldu verið borgarstjóri í 16 ár. Einasta skeiðið, hann ikki var borgarstjóri, var frá 1988 til 1992, tá Óli Heinesen røkti starvið.

Steinbjørn Jacobsen hevur síðani 1998 verið varaborgarstjóri í Klaksvík, og hevur tí áður loyst Jógvan við Keldu av styttri skeið.

Fyrstu tíðina æltar nýggir borgarstjórin at seta seg inn í tey mongu málini í kommununi, men hann ætlar eisini at seta gongd á mál, sum nýggi meirilutin ætlar sær at gera nakað við.



*Steinbjørn Jacobsen virkar nú sum borgarstjóri í Klaksvík*



# Knøpp tíðarætlan til fólkaatkvøðuna

**Løgmaður ætlar at fáa broytt heimastýrislógina áðrenn fólkaatkvøðuna í apríl. Men hetta krevur fyrst samráðingar og síðani viðgerð og samtykt á Løgtingi og Fólkatingi. Kortini hevur løgmaður góðar vónir**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*

Enn eru landsstýrið og danska stjórnin ongan veg komin í samráðingunum um at broyta heimastýrislógina, so tað verður lættari at taka yvir málsøki.

Danski forsætisráðharrin hevur enn ikki svarað løgmanni, um hann fer at taka undir við ætlanunum um at skipa rættarliga sambandið millum Føroya og Danmarkar av nýggjum, so at øll málsøki uttan ríkismál koma á føroyskar hendur samsvarandi einum tíðargivnum leisti. Men løgmaður vísir tó á, at danski forsætisráðharrin heldur ikki hevur svarað, at hann ikki tekur undir við ætlanini.

Løgmaður og danski forsætisráðharrin hava avtalað, at samráðingarnar um at broyta heimastýrislógina skulu fara fram á embætismannastigið, og løgmaður hevur alment boðað frá, at samráðingarnar skulu vera lidnar í hesum mánaðinum. Men tað ber ikki til hjá fjølmiðlunum at fáa at vita, um nakar fundur hevur verið og um nakað er komið burturúr. Tá fjølmiðlarnir biðja um innlit í gongdina í málinum eru boðini úr Tinganesi greið: »Útflýggjan av nevnda tilfari kann skaða samskiftið millum partarnar í sambandi við tilgongdina um framtíðar ríkisrættarligu støðu Føroya.«

## Skal fyri tingið

Men skal tað eydnast at broyta heimastýrislógina áðrenn fólkaatkvøðuna, sum helst verður flaggdagin, 25. apríl, má ferð koma á samráðingarnar. Tí tað er nevniliga ikki nóg mikið, at føroysk og donsk embætisfólk semjast um, hvussu heimastýrislógin kann verða broytt. Skal heimastýrislógin broytast, má uppskot um hetta leggjast fyri bæði Fólkatingið og Løgtingið at taka støðu til.

Hetta ásannar løgmaður. Hann vísir á, at júst hetta er orsøkin til, at hann ætlar, at samráðingarnar við danir skulu vera lidnar í hesum mánaðinum.

– Útgangsstøðið fyri, at vit kunnu fáa allar hinar prosessirnar í ætlanini avkláraðar við rímiligum tíðarfreistum er, at vit fáa avklárað viðurskiftini við heimastýrislógini í hesum mánaðinum. Tað er eisini hetta, eg í brævi havi boðað Poul Nyrup Rasmussen frá, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

– Men fyri at Fólkatingið og Løgtingið skulu kunna samtykkja at broyta heimastýrislógina, er neyðugt at danska stjórin og landsstýrið frammanundan eru samd um, hvussu broytingin skal vera. Og tað er hesa semjuna, vit skulu finna hendan mánaðin, ger Anfinn Kallsberg greitt.

Hetta vil siga, at føroysku og donsku embætisfólkini innan hesin mánaðin eru farin skulu gera eitt útkast til, hvussu heimastýrislógin skal broytast. Hetta skal síðani gerast um til lógartekst, og verður tað síðani lagt fyri Løgtingið og Fólkatingið.

## Viðgerðin tekur tíð

Bæði Løgtingið og Fólkatingið hava sínar tingskipanir at ganga eftir. Hesar áseta millum annað mannagongdina fyri viðgerðini av lógaruppskotum, og hvussu drúgv tíð í minsta lagi skal ganga frá tí degi, at eitt uppskot verður lagt fram, til tað kann samtykkjast.

Tingskipanin hjá Løgtinginum sigur, at uppskotið skal latast formansskapinum tríggjar dagar áðrenn tað verður lagt fram. Tá tað er lagt fram, skulu ganga tríggir dagar til tað kann koma til fyrstu viðgerð. Síðani fer uppskotið í nevnd, har álit verður skrivað, og hetta kann taka drúgva tíð. Tá so nevndarálitið umsíðir er skrivað, skulu ganga tveir dagar til uppskotið kann samtykkjast ella fellast við aðru viðgerð. Vanligt er, at hendan gongdin vanliga tekur ein mánað.

Afturat hesum kemur, at bæði Fólkatingið og Løgtingið hava nógv onnur mál, ið skulu viðgerðast. Tí má uppskotið um at broyta heimastýrislógina kroystast inn í tíðarætlanirnar hjá bæði Fólkatinginum og Løgtinginum, skal tað eydnast at fáa heimastýrislógina broytta áðrenn fólkaatkvøðuna.

Men løgmaður stúrir ikki.

– Vit skulu nokk fáa uppskotið fyri tingið, og um danski forsætisráðharrin er sinnaður at fáa heimastýrislógina broytta, ivist eg onga løtu í, at hann eisini fær uppskotið fyri Fólkatingið í góðari tíð, sigur Anfinn Kallsberg.

## Stutt valstríð

Klára Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen at leggja uppskot fyri ávikavist Løgtingið og Fólkatingið um at broyta heimastýrislógina innan alt ov nógvir dagar eru farnir av februar mánaði, kann hugsast, at broytingin verður samtykt einaferð tíðliga í mars.

Landsstýrið hevur boðað frá, at fólkaatkvøðan skal vera í apríl, og flaggdagurin hevur verið nevndur sum dagurin, tá krossurin skal setast fyri ella ímóti koyriætlanini hjá landsstýrinum fram ímóti fullveldinum. Tískil kann staðfestast, at valstríðið undan fólkaatkvøðuni í mesta lagi kann vara ein góðan mánað. Tí einki ítøkiligt er at taka støðu til, fyrr enn tað er greitt, um heimastýrislógin verður broytt ella ei.



*Løgmaður hevur góðar vónir, um at tað fer at eydnast at broyta heimastýrislógina áðrenn fólkaatkvøðuna, hóast hetta krevur viðgerð og samtykt á bæði Fólkatingi og Løgtingi*

made by VIT

**Tekniskur leiðari**

VIT sp/f sóknast eftir tekniskum leiðara at byrja skjótast til ber.

Ert tú verkfrøðingur, datalog ella hevur tú drúgvar royndir innan umsiting av teldukervum, er starvið sum tekniskur leiðari hjá okkum kanska nakað fyri teg.

Sum tekniskur leiðari kemur tú m.a. at standa fyri hesum uppgávum:

- Rakstur av innanhýsis teldukervi til menning av e-business webskipanum
- Rakstur av Hosting Center til e-business webskipanir
- Samskipan av netumsitingini hjá kundum okkara

Hevur tú hug at royna teg sum tekniskur leiðari í einari dynamiskari og spennandi fyritøku í vøkrum umhvørvi undir Bryggjubakka, send okkum so eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir o.ø.

Løn og arbeiðstíðir verða at avtala nærri.

Um tú hevur hug at vita meira um starvið sum tekniskur leiðari hjá okkum, ert tú vælkomin at ringja 319914 og spyrja eftir Óla Olsen.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. januar 2001.

P/F VIT - undir Bryggjubakka 17 - FO-100 Tórshavn
tlf: 31 99 14 - e-mail: vit@vit.fo - url: www.vit.fo

P/F VIT er ein KT-fyritøka, sum arbeiðir við menning av dynamiskum webloysnum, ráðgeving innan E-business & umsiting av teldunetum. Umframt hetta eigur og rekur P/F VIT internetportalin in.fo. 10 fólk starvast í løtuni hjá P/F VIT -Farodane eigur 80% av P/F VIT og starvsfólkini eiga hini 20%.